# Sálarsjúk børn... ein viðmerking !

TORMÓÐUR STÓRÁ
leiðandi yvirlækni,
Psykiatriski depilin



Sosialurin hevði mánadagin grein um korini hjá sálarsjúkum børnum, og eisini prát við undirritaða um hetta. Prátið kom í lag, tá blaðmaðurin vildi hava eina viðmerking til aðra grein, har foreldur kendu seg slept upp á fjall av skipanini. Viðmerkingarnar vóru av yvirskipaðum slagi, tá sjálv søgan ikki var mær kend og ikki ber heldur til at gera beinleiðis viðmerkingar til ávísar sakir. Okkurt í greinini kann misskiljast, og tí neyðugt við hesi viðmerking.

At viðgerðarligu viðurskiftini hjá sálarsjúkum børnum ikki eru nøktandi, er (tíverri) sum so ikki nakað nýtt, men nakað, sum støðugt verður arbeitt við at bøta um í góðum samstarvi millum avvarðandi myndugleikar. Vit skulu ikki leita so nógv ár aftur, tá eingin møguleiki var at fáa beinleiðis barnapsykiatriska hjálp her. Farið varð síðani undir at fáa serkøna hjálp uttanífrá at koma hendan vegin og var hetta ein bati. Í nøkur ár hava vit fingið barnapsykiatarar og barnasálarfrøðingar hendan vegin nakrar ferðir árliga. Trupulleikin við slíkari skipan var, at eingin skipað uppfylgjan var av tí arbeiði gjørt varð, og eingin beinleiðis førleikamenning var av starvsfólkum her heima á hesum økinum.

Tí varð farið undir at skipa okkara egna barnapsykiatriska toymi á psykiatriska deplinum, har vit miðvíst arbeiða við at menna førleikan her heima til at taka sær av útgreinan og viðgerð, - í góðum samstarvi við teir serfrøðingar, sum framvegis koma uttanífrá. Í 2007 fekk barnapsykiatriin fyrstu ferð sína egnu fíggjarligu játtan og hendan er tvífaldað í hesum árinum. Fleiri fólk eru vorðin tilknýtt barna- og ungdómspsykiatriska toyminum og arbeitt verður alsamt við at menna teirra førleikar á økinum, bæði hvat viðvíkur útgreinan av sjúkum og til viðgerð. Trupulleikin er, at vit ikki frammanundan hava fólk við hesum førleika, og at slíkur ikki fæst eftir einum degi, men at slík upplæring tekur tíð. Skipanin má mennast stigvíst, og gongd er í hesum máli.

Í løtuni eru 150 børn og ung knýtt at barna og ungdómspsykiatriska toyminum. Tíverri eru eisini fleiri á bíðilista, men tíbetur færri enn tað vóru fyri einum ári síðani.

Tað er sostatt ikki ein manglandi fígging, sum er orsøkin til at hjálpin/serfrøðin kemur uttanífrá, sum undirritaði verður endurgivin fyri at hava sagt. Játtanin er rættuliga nýggj á fíggjarlógini og hevur verið hækkandi eftir leisti, sum er lagdur í góðum samstarvi við avvarðandi myndugleika.

Ein annar táttur, sum verður komið inn á, er at tað eru nøkur, sum hava tørv á einum meira umfatandi greinigar- ella viðgerðartilboði, enn tað sum kann gerast við ambulantum viðtalum. Her hava vit havt møguleikan at sleppa fram at á deild ella viðgerðarstøðum í Danmark. Har er trýstið á skipanina rættuliga stórt, og vit hava ikki frammíhjárættindi, og tí verður her, eins og har, alt ov drúgv bíðitíð. Tann partin verður strongt á at loysa í Danmark, men givið er, at tað ikki er nøkur gongd leið hjá okkum at dúva upp á hetta, og at vit kundu gjørt meira við at skapt hesar førleikar her heima eisini. Tí verður í greinini komið inn á barnaverndarstovnarnar undir Almannastovuni (har teir framvegis eru), sum vit eisini í svari til fyrispurning í Løgtinginum í farnu viku hoyrdu um, og sum hava færri børn enn ætlanin var. Hetta eru ikki viðgerðarstovnar fyri børn við sálarsjúkum, um enn tey stundum fáa álagdar slíkar uppgávur. Orsøkin til at teir komu inn í prátið varð hetta keðiliga blandið av, at nakrir stovnar standa hálvtómir og stundum fáa álagdar uppgávur tey ikki kenna seg hava førleika til, samstundis sum vit brúka (nógvar) pengar til at senda børn og ung av landinum á viðgerðarstøð (aftaná drúgva bíðitíð) og samstundis sum nøkur als ikki fáa neyðuga tilboði. Her mugu vit kunna brúka tilfeingið betri og menna okkara egna. Tí gleðiligt at hetta er komið við í samgonguskjalið sum eitt av málunum, sum sitandi samgonga hevur sett sær fyri at loysa, og okkara partur í hesum arbeiði skal ikki liggja eftir.

Annars er at siga, at brotið úr samgonguskjalinum, sum blaðið hevur sett saman við greinini mánadagin, stavar frá CHE samgonguni, og er vorðið søguligt skjal.

# Reint umhvørvi og blómandi mentan

JÓGVAN ARGE
varaborgarstjóri



Tey samfeløg, sum megna at reka ein burðardyggan umhvørvis- og orkupolitikk og fylgja altjóða krøvum, fara at mennast, meðan hini detta niðurímillum.

Tey samfeløg, sum hjúkla um sítt mentunarlív og tryggja útbúgving og gransking góðar umstøður, hava bestu møguleikar at standa seg í tí hørðu kappingini.

Tjóveldi staðfestir í síni valskrá, at sum landsins størsta kommuna skal Tórshavnar kommuna slóða fyri á umhvørvisøkinum. Vit seta hægstu mál fyri umhvørvi, orku og tilfeingisnýtslu.

Vit vilja skunda undir umlegging til reina orku fyri húsarhald og vinnu, og almennar byggisamtyktir eiga at eggja til orkusparing og dygga bjálving.

Ítøkilig mál verða sett fyri umlegging frá dálkandi til varandi orku. Stuðlað verður undir upplýsing um orkusparandi tiltøk. Allar kommunalar nýbyggingar skulu vera orkuvinarligar.

Nýskipanin av kloakkunum heldur fram, og mannagongdir skula tryggja, at hesi viðurskifti eru í lagi í nýggjum byggingum frá fyrsta degi. Reglur verða gjørdar, sum tryggja, at einstaklingar, stovnar og virkir ikki dálka.

**Mentan og lestur**

Tjóðveldi ásannar, at Havnin sum høvuðsstaður og miðstaður hevur eina serliga uppgávu at lyfta, skula Føroyar náa málinum at fáa fleiri hægri útbúgvingar, fleiri lesandi og eitt fruktargott granskingarumhvørvi.

Tjóðveldi vil, at Tórshavnar kommuna er virkin í stríðnum at menna lestrar- og granskingarumhvørvið. Kommunan sær til, at miðnámsskúlar, lærdi háskúlin og granskingarumhvørvið fáa bestu staðseting og umstøður til eitt mennandi umhvørvi fyri gransking, vinnu og mentan.

Øki verða sett av til lestraríbúðir og virkað verður fyri at stig aftur verða tikin til lestrarbústaðir.

Tann skapandi mentanin fær bestu sømdir og skaptir verða karmar fyri blómandi mentanarlívi. Tónleikinum verða útvegaðar góðar framførslu- og venjingarumstøður, og virkað verður fyri at musikkskúlin fær tíðarhóskandi karmar at virka undir.

Orðaður verður ein ítróttapolitikkur, sum stingur út í kortið ætlanir fyri ítróttaligar karmar og mál í kommununi. Kommunan eigur at stuðla øllum mennandi ítróttar- og frítíðarvirksemi og øllum feløgum verða veittir somu møguleikar.

Tekur tú undir við hesum sjónarmiðum, velur tú Lista E á býráðsvalinum 11. november. X við E.

# Børn við serligum tørvi eiga ongan góðan!

LEVI MØRK



Børn við serligum tørvi eru slept upp á fjall hjá Tórshavnar kommunu og frá almennari síðu, tá ið talan er um frítíðrskúlatilboð.

Ja, vit hava ein stóran trupulleika á økinum. Tí tað er einki kommunalt frítíðarskúla tilboð fyri børn við serligum tørvi eftir 2. flokk. Heldur ikki, fylgja tilsvarandi játtan við og hølisviðurskiftini á økinum eru sera vánalig.

Hetta er ein neyðloys frá almennar síðu.

Sum er nú er, hava børn ikki krav upp á kommunalt frítíðartilboð aftan á 2. flokk, hetta er eisini galdandi fyri børn við serligum tørvi, her vísur Almannastovan til høluni hjá Javna í Gundadali. Har eru, sum eg havi skilt, einans børn við diagnosu innan ADHD/DAMP-økið. Her eru øll børnini í sama frítíðarskúla høpi. Talan er um børn við autismu og børn við øðrum trupulleikum.

**Javni ger eitt gott arbeiði:**

Men lat meg sláa tað rimmar fast, at Javni og tey starvsfólkini, sum har arbeiða gera eitt gott arbeiði. Men tað er ikki her í eg rætti fokus, so er tað komið upp á pláss. Eg eri meira eftir, hvussu ið tað almenna og Tórshavnar kommunan raðfesta børn við serligum tørvið.

**Hoyvíkar skúli-og frítíðarskúli**

Hoyvíkar Skúli hevur gott orð á seg sum ein frálíkur skúli, ið ger eitt gott arbeiði, fyri teir veiku næmingarnar. Hetta er eisini galdandi í Frítíðarskúlanum í Hoyvík, har sera væl útbúgvið fólk tekur sær av børnum við serligum tørvi, men her skal meira til.

**Ov lág játtan til betri karmar**

Her fylgir eingin fíggjarlig játtan til betring av karmunum, sum er eitt krav, um tú skalt hava ein munagóðan kvalitet á økinum. Sjálvt um, Tórshavnar kommuna, roynir, at fylgja við, er støði ikki gott nokk í dag. Nej, her er nógv eftir til at støði skal vera betri.

**Øll hava ymiskan tørv**

Foreldur skríggja um hjálp og um betri fagligt innihald, fagligt støði og betri karmar, etc, men einki hjálpir. Øll serbørn vera bólkaði sum tey eru eins og hava sama tørv. Tú mást hyggja, at tí einstaka barninum og øll børn hava jú ymiskan tørv. Tað eru alt ov nógvar fyribilsloysnir á økinum, hvat við at finna eina verandi loysn.

**Eg eri troyttur av fyribilsloysnum**

Nej, her vantar, yvirornað politisk stev, har bæði kommunalir og landsinds myndugleikar, síggja veruleikan í eyguni, og steðga, alt sum eitur fyribilsloysir. Eg eri troyttur, av øllum hesum fyribilsloysnum á hesum økið.

**Børn og avvarandi eru gíðslar**

Nej, lat okkum fáa skil uppá hetta økið, við at útbyggja verandi karmar í Frítíðarskúlanum í Hoyvík, har pláss vera til børn við serligum tørvið, heilt upp til 4-til 5 flokk. Ella gera ein nýggjan bygning, sum loysir trupulleikan, og harvið fjerna vit fyribilsloysnir. Tí tað eru børn og foreldur sum í seinasta enda, eru gíðslar í hesum málið.

**Hetta er ein tvørpolitisk avgerð:**

Her krevs ein tvørpolitisk avgerð um, millum land og kommunu, har eg haldi, at hetta økið skal yvirtakast og har Tórshavnar kommuna, fær fulla ábyrgd á økinum og tað fíggjarliga fylgjur við.

Vel Levi Mørk, eg eri nakað fyri øll.